*Avgjørdur Edmund Joensen, løgmaður:*

# Eg pakki kuffertið kemur innbjóðing at vitja Oljunoreg



*Løgmaður frætti gjøgnum Sosialin, at Jens Stoltenberg fegin vildi koma til Føroya at tosa um oljusamvinnu. Nú frættir Stoltenberg, eisini gjøgnum blaðið, at løgmaður fegin vil koma til Noregs. Spurningurin er nú hvør verður fyrstur at bjóða*

*Edmund Joensen, løgmaður, sum umsitur oljumál, heldur tað vera eitt gott hugskot at fáa norska oljumálaráðharran at vitja í Føroyum. Hann heldur tað eisini vera eitt gott hugskot, at løgmaður fer á vitjan í Noregi fyri har at kunna seg við oljuvinnuna. Kemur ein innbjóðing frá Jens Stoltenberg um at vitja í Noregi, so pakkar løgmaður kuffertið beinanvegin sigur Edmund Joensen m.a. við Tíðindablaðið Sosialin.*

JAN MULLER

Herfyri segði norski oljumálaráðharrin, Jens Stoltenberg við Tíðindablaðið Sosialin, at fekk hann eina almenna innbjóðing at vitja í Føroyum, so fór hann alt fyri eitt at taka av.

Í samrøðu við blaðið, sum var á oljuráðstevnuni í Stavanger segði Jens Stoltenberg, at hann fegin sá eina samvinnu millum Føroyar og Noreg og oljuøkinum. Hann vildi í hvussu er gera sítt til at hetta gjørdist veruleiki.

**Heilt náttúrligt at vit samvinna við Noreg**

Vit hava spurt Edmund Joensen, løgmann, um hann ikki ætlar at taka hesi orðini til eftirtektar og bjóða norska oljumálaráðharranum henda vegin!

-Vit hava avgjørt brúk fyri at tosa við hvønn annan, tvs. londini í hesum økinum, og tað skuldi verið heilt náttúrligt, at vit føroyingar høvdu eitt gott og gevandi samarbeiði við t.d. Noreg sigur Edmund Joensen, sum vísir á, at hann sjálvur hevur sett sær fyri at kunna seg við nettup oljuvinnuna, sum jú er tað økið, hann umsitur.

-Í hesum sambandi havi eg eisini ætlanir um at hitta norska oljumálaráðharran. Hvussu tað verður og nær er ikki lagt fast enn, men tað hevur mín stóra áhuga. Um tað so verði eg sjálvur, sum fari til Noregs fyrst, ella um tað verður Stoltenberg, sum kemur henda vegin, tað skulu vit nokk finna út av.

Dagurin er enn ikki ásettur, men løgmaður sigur, at hann er ikki langt burturi.

**Ikki rætt at vitja Bretland nú**

*-Men tú hevur longu fingið innbjóðing at vitja bæði í Hetlandi og í Bretlandi - hvussu ber tað til, at tú ikki hevur brúkt hesi høvi, áðrenn tú fer at taka stig at fara til Noregs?*

-Tað er rætt, at tað fyriliggur innbjóðing bæði úr Bretlandi og Hetlandi, men tá vit hugsa um oljuvinnu, so er tað kanska Noreg, sum hevur mest at læra okkum. Teir hava ment eina oljuvinnu bæði á opnum havi og á landi hesi seinastu árini, og tað er kanska hetta, sum vit áttu at skeitt mest til umframt Skotland kanska. Men norðmenn hava avgjørt eina vitan, sum vit kunnu njóta gott av. Og hetta má tí eisini liggja ógvuliga frammarliga.

*-Um nú Jens Stoltenberg frættir um orð tíni í føroyskari pressu, at tú fegin vil taka av eini innbjóðing til Noregs, og hann sendir eina slíka, fer Føroya løgmaður tá at taka av?*

-Ja, so fer hann ógvuliga skjótt at pakka kuffertið.

Vit spurdu løgmann, um orsøkin til at hann ikki ger álvara av at fara til Bretland og annars hevur eina sera varna fyri ikki at siga kalda støðu mótvegis Bretlandi, hevur nakað at gera við misnøgd hansara og føroyinga sum heild við støðuna hjá Bretlandi í marknatrætuni!

**Bretar ikki serliga vælviljaðir móti okkum**

-Nú er tað ein veruleiki, at føroyingar hava ikki hildið, at bretar hava verið serliga large ella vælviljaðir mótvegis føroyingum, tá vit hava viljað fingið markið uppá pláss. Tað hevur tikið alt ov langa tíð. Frá føroyskari síðu hevur verið ein stórur vilji til tess at fáa markið uppá pláss, og vit halda sjálvandi, at rættur okkara til landgrunnin er rímuligur.

Løgmaður vísir á, at tað eru nógv ár síðani, at funnið varð fram til, hvar sjómarkið skal vera. Talan var um eina ósemju um eina gráa sonu og ikki annað.

-Tað er so heldur ikki ókunnugt, at tá bretar bráddliga seta mark stutt sunnan fyri Suðuroynna, vóru allir føroyingar vónsviknir um tað, og hildu, at vit vóru órímuliga viðfarnir av bretum.

Samráðingar hava verið um hetta í mong ár. Eitt sindur nærri er komið einum úrsliti, men enn er ikki komið á mál, og enn er vandi fyri, at málið endar í rættinum. Løgmaður heldur tí ikki, at henda støðan júst er rætta høvið at fara til Bretlands at njóta blíðskap.

-Hinvegin havi eg alla tíðina sagt, at skulu politiskar samráðingar fara fram, so eri eg tilreiðar at fara avstað. Tað er tó ikki komið hartil enn, og eg havi hildið, at tað hevur ikki verið rætta høvið at fara til Bretlands, fyrr enn vit hava loyst hetta málið.


Hví bara telefon ella fax ella... og ikki bæði

**FAX & TELEFON umframt FAXSVARARA & KOPIMASKINU í sama tóli**

– og fyri RÍMULIGAN PENGA!

SAGEM er loysnin!



Heimsins fittligasta til vanligt A4-pappír

Eingi samanrullað faxpappír, men vanlig A4-ørk við 1. floks prenti!

**SAGEM 330**

- 4 ringitónar at velja ímillum
- LCD-display
- Bert neyðugt við einari telefonlinju
- Ringir bert tá tað er telefon
- Goymir 40 telefonno
- Goymir upp til 10 innkomandi A4-síður, skuldi pappír ikki verið í
- Kann avlesa til seinni sending 8 A4-síður
- Rundskriving til 5 móttakarar – eisini til seinni sending ásetta tíð

– umframt hóp av øðrum snildum!

TILBOÐ!

Vanligur prísur ......... KR. 7.375,- v/ MVG

– men í býti við gamla faxið ÷ KR. 1.200,-

Prísur tils. KR. 6.175,- v/ MVG (uttan MVG KR. 4.940,-)

FX formula XEROX

STIÐJAGØTA 11
POSTRÚM 1078
110 TÓRSHAVN
TLF. 11115 · FAX 17115